Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Leiðari til bú- og umlættingarstovn fyri børn og ung við autismu í Klaksvík

Søkt verður eftir leiðara til bú- og umlættingarstovnin á Garðavegi í Klaksvík til setan 1. oktober 2007 ella eftir nærri avtalu.

Stovnurin er til børn og ung við autismu. Talan er um bæði bústovna- og umlættingartilboð. Eftir ætlan verður stovnurin í næstum fluttur í onnur hús í Klaksvík, og virksemið verður økt, soleiðis at fimm búpláss og fimm umlættingarpláss verða. Leiðarin kann við tíðini eisini fáa ábyrgd av fleiri líknandi arbeiðsuppgávum.

Ynskiligt er, at tann sum settur verður, hevur kunnleika og royndir í arbeiðinum við fólki við sjúkugreiningini autismu. Eisini er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur roynt seg sum leiðari áður, umframt at hava fram haldsútbúgving innan økið.

**Annars verður sóknast eftir fólki, sum**
- Hevur lokið námsfrøðiligt ella líknandi prógv
- Hevur hug og hegni at fyrisita og leiða
- Kann átaka sær nýggjar avbjóðingar/broytingar
- Hevur vilja og evni at samstarva við viðskiftafólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur hugflog at síggja møguleikar fram um forðingar
- Kann seta greiðar linjur

**Setanartreytir:**
Setanarøki er Nærverkið, og tænastustaðurin er í løtuni í Trivnaðartænastuni. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóanes N. Dalsgaard, deildarleiðara, á telefon 304020.

**Umsókn:**
Umsókn við hjáløgdum próvskjólum, viðmæli og lívsgongdarlýsing verða at senda til:

**Nærverkið**
Trivnaðartænastan
Stílað.: Jóanes N. Dalsgaard, deildarleiðari
Eirargarður 2,2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 7. september 2007.**

Trivnaðartænastan

## Pedagogar til Trivnaðartænastuna

Vit søkja eftir tveimum Pedagogum til Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík.

Tvey Pedagogstørv eru leys at seta frá 1. oktobur 2007

**Setunarviðurskifti:**
Størvini vera sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Sambýlið og Bústovnurin á Rúnarvegi í Runavík.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftis arbeiði. Vikuskiftisarbeiði er eina ferð um mánaðin.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:
Bústovnurin á Rúnarvegi 6
620 Runavík
Stílað: Oddfríða Højgaard, leiðara

**Umsóknarfreist: 10.09.2007.**

Trivnaðartænastan

## Reingerðarstarv til Verkstaðin á Brekku í Klaksvík

Søkt verður eftir reingerðarfólki í farloyvisstarv til Verkstaðin á Brekku í Klaksvík.

Arbeiðistíðin er 15 tímar um vikuna. Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 456976, millum kl. 8 – 16 gerandisdagar.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Starvið verður sett sum skjótast.

Skrivlig umsókn skal sendast til.

**Verkstaðin á Brekku**
á Brekku 31,
Fo 700 Klaksvík

**Umsóknarfreistin er 7. september 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

---




# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN

## Skeið innan almenna fyrisiting
### heystið 2007

**Alment innlit** **hold 4**
**Tíð: 3. september 2007 kl 09.00-16.00**
Innlitslógin verður viðgjørd og útgreinað. Hetta fevnir m.a. um:
- Lógarøkið - hvat er fevnt av lógini? - Skjalahugtakið sambært innlitslógini
- Skyldan at skriva upp - RæSturin til skjalainnlit
- Tagnarskylda - avmarking av ræSttinum til innlit
- Avgerðin - fráboðan, grundgeving og kæruvegleiðing

**Tilmelding: áðrenn 28. aug. 2007 ella so leingi pláss er**

**Málrøkt og talgild journalski** **hold 3**
**Tíð: 10; 11. sept. 2007 kl. 09.00-16.00**
Endamálið við skeiðnum er at fáa innlit í málsgongdir, frá tí mál tekur seg upp, til tað er liðugt viðgjørt. Greitt verður eisini frá ymsum fyribrigdum, ið lætta um og samstundis tryggja eina góða málsgongd. Eisini verður nortið við, hvussu mál verða varðveitt á besta hátt, so at innihaldið ikki fær skaða ella verður burtur.
**Skeiðið fevnir um:**
- Samspæl millum journal og málsviðgerð
- Dagligar mannagongdir - eftirstøðueftirlit
- Lógarkrøv - arbeiðsgongdir - fysisk málrøkt

**Tilmelding: áðrenn 3. sept. 2007 ella so leingi pláss er**

**Fyrisitingarlógin/Málsviðgerð o.a.** **hold 5**
**Tíð: 17. og 18. sept. 2007 kl. 09.00-16.00**
Málsviðgerðarreglurnar í Fyrisitingarlógini verða viðgjørdar:
- Lógarøki hvat fevnir fyrisitingarlógin um? - Reglurnar um vegleiðing, umboðan og ógegni
- Partshoyring, rætturin at geva ummæli, grundgeving, kæruvegleiðing
- Tagnarskylda, avhandan av trúnaðarligum upplýsingum - Reglurnar um partsinnlit

**Tilmeldingarfreist: áðrenn 10. sept. ella so leingi pláss er**

**Starvsfólkafyrisiting** **hold 2**
**Tíð: 19; 20; 21. sept. 2007 kl. 09.00-16.00**
Nortið verður við teir 4 høvuðstættirnir í starvsfólkafyrisiting, sum eisini eru grundarstøði í starvsfólkapolitikkinum:
- **Setan -** hvussu verður rætti persónurin funnin til eitt starv
- **Fasthaldan -** hvussu verða nýsett starvsfólk móttikin, hvørjar arbeiðsumstøður verður bjóðað teimum
- **Menning -** týdningurin av støðugari førleikamenning og hvussu hon kann verða skipað
- **Fráferð -** hvussu verður ein góð fráferð úr starvi skipað, óansæð um starvsfólkið sjálvt velur at fara úr starvið, ella neyðugt av einari ella aðrari orsøk er at siga starvsfólkið upp.

**Tilmelding: áðrenn 5. sept. 2007 ella so leingi pláss er**

**Dugir tú at samskifta** **hold 2**
**Tíð: 27; 28. sept. 2007 kl. 09.00-16.00**
Øll hava fyri neyðini at duga væl at samskifta bæði skrivliga og munnliga. Her er skeiðið, sum rykkir ullina úr munninum og vendir stílaskrivingini á høvdið. Bølir tú uppi yvir skrivligum uppgávum? Fært tú ikki boðskapin ordiliga fram í brøvum? Gerast teldupostarnir ov drúgvir? Taka teir ov langa tíð? Og hvussu er, tá tú skalt reisa teg og siga nøkur orð í einari mannfjøld? Firvaldar í búkinum? Dettur tann svarti "klappurin" niður fyri eyguni?
**Tilmelding: 13. sept. 2007, ella so leingi pláss er eftir.**

**Alment starv** **hold 2**
**Tíð: 1; 2. okt. 2007 kl. 09.00-16.00**
Skeiðið er ætlað teimum, sum í dagliga yrki sínum fáast við starvsfólkamál innan almennu fyrisitingina, umframt øðrum, ið ynskja at fáa kunnleika til hesi viðurskifti. Viðgjørt verður:
- **Starvsetan -** m.a. krøv til starvslýsingina, málsfyrireiking og avgerðina
- **Rættindi og skyldur undir setan -** m.a. frítíð/hjástørv, decorum, talufrælsi, loyaltitetur og tagnarskylda
- **Ávaring og uppsøgn -** m.a. krøvini til dokumentatión, proportionalitet, ætlanarskriv (partshoyring) og grundgeving viðgjørt verður m.a. uppsagnaravtalur, rúsdrekkatrupulleikar, samstarvstrupulleikar, sjúka/frávera og sparingar/bygnaðarbroytingar umframt ymisku avleiðingar av uppsøgn.

Skeiðið er skipað sum fyrilestur, kjak og uppgávu/bólkaarbeiði.
**Tilmelding: áðrenn 17. sept. 2007 ella so leingi pláss er**

**Persónsupplýsingarlógin - og persónsdátuvernd á arbeiðsplássinum** **hold 3**
**Tíð: 3; 4. okt. 2007 kl. 09.00-16.00**
Endamálið við skeiðnum er at kunna um persónsupplýsingarlógina og at greiða frá skyldum og rættindum í starvsviðurskiftum, tá tað snýr seg um skráseting av persónsupplýsingum.

Dømi verða tikin frá donskum og norskum viðurskiftum og avgerðir í dátueftirlitið teirra
Útgangsstøði er Persónsupplýsingarlógin, hugt verður eisini at aðrari lóggávu á økinum t.d. revsilógini, javnstøðulógini og mannarættindasáttmálanum.
**Tilmelding: áðrenn 18. sept. 2007 ella so leingi pláss er**

**Innanhýsis skeið**
Innanhýsis skeið verða skipað í tøttum samstarvi við kundan. Fyrimunir við innanhýsis skeiðum eru m.a., at kundin hevur møguleika sjálvur at velja evni, tíð og stað
- undirvísingin er tillagað tørvin hjá luttakarunum, stovninum ella fyritøkuni
- uppgávur og dømi frá gerandisdegnum verða nýtt
- innanhýsis skeið eru bíligari fyri hvønn luttakara

**Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

Marknagilsvegur 75, Postrúm 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo,
www.skeidsdepilin.fo